# Føroyagrunnurin eigur rós uppiborið



*- Við verandi viðtøkum beri eg avgjørt ótta fyri, at grunnurin fyrst og fremst fer at taka atlit til áhugamál í Norðoyggjum, tí fleiri av viðtøkunum hella móti at ganga áhugamálum í Norðoyggjum á møti, sigur formaðurin í Búskaparráðnum, Johnny í Grótinum.*

*Mynd: Savnsmynd*

**Formaðurin í Búskaparráðnum, Johnny í Grótinum, fegnast um, at nevndin í Føroyagrunninum hevði dirvi til at selja stóran part av sínum ognum í JFK til Hanus Hansen og Norðoya Sparikassa**

JFK sølan
Páll Holm Johannesen
pall@sosialurin.fo

Ágangurin móti nevndini í Føroyagrunninum hevur verið stórur seinastu dagarnar. Eftir óvæntaðu søluna av JFK í vikuskiftinum hevur bæði landsstýrið og andstøðan sett stórt spurnartekin við framferðarháttin hjá nevndini í Føroyagrunninum.

Formaðurin í Búskaparráðnum tekur ikki undir við atfinningunum frá landsstýrinum og andstøðuni.

-Eg skilji gott, at almenningurin ørkymlast, at JFK ikki var boðin út alment, tí nú koma vit ongantí at kenna rættað prísin.Nevndin í Føroyagrunninum eigur kortini rós uppiborið fyri hava dirvi til at skera ígjøgnum og selja ein stóran part av ognunum í JFK, tí tað var ein veruligur vandi fyri, at fyritøkan ongantíð varð seld, um hon skuldi fylgja politisku leiðreglunum, tí tað eru so nógv lokal atlit í málinum, heldur Johnny í Grótinum.

Hann sigur seg skilja grundgevingina hjá formanninum í Føroyagrunninum, Leif Abrahamsen, fyri at fremja eina skjóta sølu av JFK.

-Tað kann væl hugsast, at um sølan av JFK skuldi viðgerast á embætismannastigi og teimum ymisku verkafeløgunum í Norðoyggjum, hevði hon møguliga vera forðað. Eg haldi, at vinningurin við at fáa eitt privat dynamiskt virki er væl størri, enn tapið við ikki at fáa rætta marknaðarprís, sum nógv hava funnist at, heldur Johnny í Grótinum

Búskaparráðið hevur í sínum frágreiðingum í fleiri ár eftirlýst, at politikararnir taka sær um reiggj og seta skjøtil á einskiljingartilgongdina. Formaðurin fegnast nú um, at ferð er sett á einskiljingina av almennum ognum.

- Vit hava eftirlýst eini einskiljing av fiskivinnufyritøkunum fyri at fáa marknaðargjørt vinnuna í størri mun. Orsøkin er tann, at í einum skiftiligum altjóða umhvørvið skulu tillagingar alla tíðina fremjast. Politisk settar nevndir taka atlit til arbeiðspláss og regionalpolitikk, harvið verður tillagingin til broytt marknaðarkor útsett óneyðugt, og tá kann gerast skrædlið gerast tess størri – tí tillagingin má henda einaferð. Á privatum hondum verður tað atlitini til eginognina og harvið veruligu virðisskapanina, ið vera avgerðandi, og tá vil tillagingin sannlíkt gerast smidligari.

## Savnað í Norðoyggjum

Í Degi og viku í gjár kom undan kavi, at sambært viðtøkunum fyri Føroyagrunninum, er grunnurin til ein og hvørja tíð álagdur at eiga ognir í JFK. Sambært aðrari viðtøku fyri grunnin skal landsstýrið velja tríggjar limir í nevndina, meðan verkafeløgini í Klaksvík velja seinasta umboðið í nevndini.

Hesar viðtøkur kunnu vera ein forðing fyri einum dynamiskum Føroyagrunni, metir Johnny í Grótinum. Hann heldur, at núverandi viðtøkur kunnu fara at hava við sær, at grunnurin framvegis fyrst og fremst fer at taka atlit til áhugamál í Norðoyggjum, heldur enn at virka sum ein grunnur, sum bara tekur atlit til marknaðagrundað atlit.

- Við verandi viðtøkum beri eg avgjørt ótta fyri, at grunnurin fyrst og fremst fer at taka atlit til áhugamál í Norðoyggjum, tí fleiri av viðtøkunum hella móti at ganga áhugamálum í Norðoyggjum á møti, sigur klaksvíkingurin Johnny í Grótinum.

## Til útbúgving

Eftir søluna í vikuskiftinum trýtir ikki við peningi í Føroyagrunninum. Grunnurin eigur í dag 120 mió. krónur, harav 82 mió. í tøkum peningi og hinar 40 mió. krónur í partabrøvum í JFK.

Mongu milliónirnar í Føroyagrunninum kunnu óiva koma væl við hjá mongum kroystum vinnulívsmonnum, men formaðurin í Búskaparráðnum mælir nevndini til nýta peningin til annað enn í føroyska vinnulívinum.

Johnny í Grótinum vísir á grein fýra í viðtøkunum fyri Føroyagrunnin, sum sigur, at grunnurin kann nýta pening til at stuðla útbúgving.

-Heldur enn at lata seg ávirka av mongu vinnulívslobbyistunum, sum óiva vilja royna at seta seg í samband við nevndarlimirnar í Føroyagrunninum, átti grunnurin at nýtt peningin til at stuðla útbúgving. Ein frálíkur máti kundi veri at umskúla stóran part av flakafólkinum, sum eru hótt av arbeiðsloysi, heldur Johnny í Grótinum.

Hann leggur afturat, at velur nevndin eisini at gera íløgur í partafeløg, so má tilmæli vera at gera íløgurnar grundað á marknaðaratlit, sum geva størsta avkasti, og ikki regional ella politisk atlit.

grunnurin, sum landsstýrið varðar av, hevur gjørt avtalu um sølu av partabrøvum í JFK-samtakinum – uttan gjøgnumskygni og alment útboð.

- Vit í Tjóðveldisflokkinum halda ikki, at avtalan samsvarar við tær leiðreglur, sum undanfarna landsstýrið gjørdi, og vit halda ikki, at ítøkiliga avtalan, sum fyriliggur, er í samsvar við tann politikk, sum settur er út í kortið fyri einskiljingum.

Tá ið vit hittu Karsten Hansen fyrrapartin í gjár, var hann uttanlands og hevði tí ikki havt møguleikar at fylgja við øllum tí, sum sagt og skrivað er í hesum máli.

- Men eg havi so fylgt málinum eftir førimuni, segði hann.

Karsten ásannar, at best hevði verið, um sølan av nevndu partabrøvum var farin fram sambært teimum leiðreglum, sum landsstýrið hevur sett sær fyri í slíkum málum.

## Tvær síður

Fyrrverandi fíggjarmálaráðharrin sigur, at hetta málið hevur tvær síður.

- Fyri lokalsamfelagið í Norðoyggjum er hetta ivaleyst ein góð loysn. Endamálið við Føroyagrunninum er at skapa virksemi í økinum, men sum løgtingsmaður og fyrrverandi fíggjarmálaráðharri er eingin ivi um, at avtalan millum partarnar er ikki í samsvari við leiðreglurnar.

Karsten minnist aftur á tíðina, tá ið JKF-samtakið eins og Kósavirkið fór av knóranum, og Føroyagrunnurin so gott sum ongan pening átti til endurreisn av virkseminum.

- Eg var næstformaður í Klaksvíkar býráði um hetta mundið, og vit kallaðu allar góðar kreftir til fundar um, hvussu vit kundu bjargað virkseminum á føtur aftur – og tað eydnaðist tíbetur við góðari hjálp, sigur hann.

Norðoyatingmaðurin vísir á, at tað, sum kanska kann "forsvara" ítøkiliga málið í ein ávísan mun, er, at ognirnar, sum Føroyagrunnurin eigur í dag, eru skaptar í Norðoyggjum.

- Men tað forsvarar so heldur ikki, at politisku leiðreglurnar ikki eru fylgdar.

## Spurningurin

Fyrrverandi fíggjarmálaráðharrin heldur, at spurningurin, sum landsstýri og løgting nú mugu seta sær, er, um vit framhaldandi skulu hava hesar grunnar, sum eru suverenir – ella um vit skulu hava eina aðra skipan.

- Hóast Føroyagrunnurin og Framtaksgrunnurin verða tiknir av, kemur eingin peningur aftur í landskassan, tí hetta eru vinnurekandi grunnar, har møguligar ognir fara til vælgerandi endamál – og ikki aftur til innskjótaran.

Karsten Hansen sigur, at støðan við Fíggingargrunninum og Føroya Banka er ein onnur; her er ein "klausulur" á, sum sigur, at avlopið aftur í landskassan.

- Vit eiga at gera støðuna upp, hvat vit ætla við hesum grunnum í framtíðini, sigur fyrrverandi fíggjarmálaráðharrin.

## FAKTA

### Konjunkturfrágreiðing 2004:

Ikki minni eru bygnaðarskeivleikar í fiskavirkisvinnu, sum í alt størri mun kemur í trupulleikar, tí kappingin á marknaðinum harðnar. Tað er ongin ivi um, at tá bæði Fiskavirking og Kósin eru almennar fyritøkur, eru tær ikki eins kravmiklar um avkast av eginpeninginum, sum vóru tær privatar fyritøkur.

Myndugleikarnir hava ikki dugað at tikið røttu avgerðina í rætta tímanum – at einskilja fiskavirkini, tað almenna eigur. Og hetta kann fara at føra til eitt skrædl, sum verður alt ov stórt í mun til tað, sum neyðugt var.

Uttan at seta at leiðslunum í fiskavirkjunum, ber til at siga, at tað almenna er ikki egnað til at eiga og reka vinnuligt virksemi, eins og flakavirki. Til tess hava politikararnir alt ov mong onnur atlit at taka – bæði av ideologiskum slag og so ikki minst av regionalum partapolitiskum slag.

Lítið er at ivast í, at tey marknaðarviðuskiftini sum eggja til umskipanin av fiskavirkisframleiðsluni í grannalondunum, eisini hava árin á okkara framleiðslu. Tí áttu vit at vænta eina stigvísa tillaging til broyttu viðurskiftini. Skal tillagingin henda so smidliga sum gjørligt, er rættast at virkini eru á privatum vinnuligum hondum, tí tá eru tað atlitini til sjálva eginognina, sum telja mest og ikki politisk atlit.

### Konjunkturfrágreiðing 2003

Tað almenna eigur meginpartin av kapitalinum í fiskavirkjunum og tað eru tí avgerðirnar í alment settum nevndum, sum hava ávirkan á, hvat ið hendir í vinnuni.

Heldur enn at herða forðingarnar eru ráðini at fara undir at gera vinnuna alla leysa av politiskari stýring. Ein umfatandi umskiping av lógarverkinum um fiskiskap er neyðug, eins og neyðugt er at fult handilsfrælsi verður við fiskavørum. Allir serligir fiskivinnustudningar eiga at verða tiknir av og vinnan viðgjørd eins og allar aðrar vinnur í landinum. Einskiljing av al-mennum vinnufeløgum í fiskivinnuni er eisini eitt neyðugt stig í hesum sambandi.